
Bertel Haarder, kirkjumálaráðharri, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, skriva undir

# Samráðingarnar um kirkjuna lidnar

**Fríggjadagin skrivaðu Bertel Haarder og Jógvan á Lakjuni undir eina yvirlýsing, ið staðfestir, at samráðingarnar við donsku stjórnina um yvirtøkuna av Fólkakirkjuni eru av. Tætt samstarv skal tó vera millum ta føroysku og donsku kirkjuna í framtíðini**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, og Bertel Haarder, danskur kirkjumálaráðharri, staðfestu á Føroysku sendistovuni á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn fríggjadagin, at samráðingar um yvirtøkuna av Fólkakirkjuni eru av. Hesar samráðingarnar hava annars verið drúgvar. Farið varð undir at fyrireika yvirtøkuna í 1998, og nú er so upp til Løgtingið at taka støðu til, um yvirtøkan skal fremjast í verki.

Umframt landsstýrismannin vóru Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, Andreas Petersen úr Javnaðarflokkinum og Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum komin niður til Keypmannahavnar. Einki umboð úr andstøðuni hevði valt at vera til staðar, tá Jógvan á Lakjuni og Bertel Haarder settu sínar undirskriftir á yvirtøkuskjalið. Harafturat vóru eisini tvey umboð fyri kirkjuliga fylgibólkin og embætisfólk við til undirskrivingina.

Bertel Haarder nevndi millum annað í síni røðu, at hann helt yvirtøkuna vera eina natúrliga gongd, eftir at Føroyar høvdu fingið varabisp í 1963. Føroyar vórðu sjálvstøðugt bispadømi í 1990, eftir at hava verið undir bispinum í Keypmannahavn í øldir.

Kirkjumálaráðharrin legði tó dent á, at ætlanin framvegis er, at samstarv skal verða millum fólkakirkjurnar í Danmark og í Føroyum.

Men hvat helt Bertel Haarder um, at hvørki Føroya bispur ella dómpróstur vóru til staðar, tá Felags yvirlýsingin varð undirskrivað fríggjadagin?

- Det har jeg overhovedet ingen kommentar til. Jeg har den største sympati for Hans Jacob, som har været med til alle bispemøder. Jeg tror, jeg ser ham igen den 7. maj. Jeg er sikker på, at han er ked af, at han ikke kunne være med, var svarið hjá danska kirkjumálaráðharranum.

### Tjóðskapurin og kristnilívið

Jógvan á Lakjuni byrjaði við at endurgeva fyrsta ørindi í sálminum »Fedranna kirkja« eftir Gudmund Bruun – bæði á føroyskum og í danskari týðing. Harafturat vísti landsstýrismaðurin á, at føroyska kirkjan hevði ment sín egna bygnað og mentan eftir siðaskiftið, hóast læran var tann sama sum í Danmark.

Landsstýrismaðurin umrøddi eisini ta politisku


*Norðurbryggjan var karmur um samkomu fríggjadagin í sambandi við, at føroyingar yvirtaka fólkakirkjuna*